# Til minnis um gomlu Dimmu


Dimmalætting.
Amtstidende for Færoerne.
Nr. 1. Løverdagen den 5te Januar 1878. 1ste Aargang.
Udlandet.
Død i Orkenen.

*Fyrsta Dimmalætting sum kom í 1877*

**Tá Dimmalætting í gjár fór á nýggjar hendur, fór eisini ein av síðstu stóru familjufyritøkunum í landinum í søguna**

DIMMALÆTTING
*Óli Jacobsen*
*oli@sosialurin.fo*

***Keldur:** Arnbjørn Ó. Dalsgarð: Føroysk blaðsøga FF-blaðið*

Tað er ikki bert hjá teimum nærmastu, partaeigarunum, at tíðindini um eigaraskiftið hjá Dimmalætting kendist við sorgblíðni.

Í meira enn eina øld hava fólk havt eina støðu til Dimmalætting. Hon var blaðið, sum fólk antin ”elskaðu” ella sum sum tey ”elskaðu at hata”. Tó ikki meira, enn at hetta skiftið eisini hjá hesum seinnu er ein løgin kensla. Tí uttan mun til, hvat ein helt um Dimmalætting, so varð hon lisin og diskuterað.

## Fekk langt lív

Tað vóru royndir at geva eitt blað út í Føroyum áðrenn Dimmalætting, nevniliga Færingetidende. Av teimum mongu bløðunum, sum síðan eru komin út er bert Sosialurin til í dag, men hann byrjaði nærum 50 ár seinni.

Dimmalætting sá dagsins ljós í 1877, og tað var V.U. Hammershaimb, sum kom við uppskotinum um hetta ódeyðiliga navnið.

Høvuðsstuðlarnir hjá Færø Amtstidendes Trykkeri, sum gav Dimmalætting út, vóru donsku embætismenninir og borgarar í Havn. Millum hesar var eisini Jens Olsen, keypmaður í Havn, sum seinni gjørdist stuðul av Føringafelagið og Føringatíðini. Hann var annars versonur gamla sýslumannin H.C. Müller.

Ein annar stuðul var Enok Bærentnsen, pápi fyrsta og einasta føroyingin, sum gjørdist amtmaður.

Upplagið var ikki tað stóra. Heilt fram til aldarskiftið lá tað um 3-500. Tað var ikki fyrr enn í 1920, at tað kom uppá 1.200. Men tá fór at ganga skjótt.

Dimmalætting var frá byrjan av eitt konservativt blað, sum í donskum politikki stuðlaði stjórnini og sum ikki prentaði tilfar, sum kundi føra til rumbul.

Longu í 1879 gjørdist Dimmalætting lýsingarblað. Hóast kunngerðirnar ikki góvu pengar, hjálpti hetta til at styrkja støðuna hjá blaðnum millum lesararnar. Hesa støðu hevði blaðið í meira enn 100 ár, tá ið vit fingu alment lýsingarblað. Hetta førdi eisini við sær, at meðan øll fyrr lósu almennu kunngerðirnar, eru tey nú bert nøkur fá.

## Føroyskir og danskir blaðstjórar

Fyrsti blaðstjórin á Dimmalætting var løgfrøðingurin Lütje Lützen f. 1848. Hann var somur Evu og A.C. Lützen, sum var tann fyrsti Lützen í Føroyum. Hann arbeiddi hjá sorinskrivaranum, men flutti seinni til Korsør.

Longu i 1880 tók Oliver P. Effersøe við. Hann var sonur fyrsta Effersøe í Føroyum, Jón. Hann var millum annað við í krígnum móti Týsklandi í 1864, sum tað hevur verið greitt frá í røðini Hendur ið Sleptu.

Ein blaðstjóri, sum kom at hava stóran týdning fyri blaðið var Rasmus Effersøe. Hann stuðlaði áhuganum fyri føroyskari mentan og máli. Aðrir blaðstjórar fram til Samuelsentíðina vóru: Louis Berg, H.C. Petersen, giftur við Elsu Petersen, fotografi, Jacob Johansen, Emil Bruun, Enok D. Bærentsen, Søren Muller, langabbi blaðstjóran á Sosialinum, Christian Heilskov, Oluf Skaalum og Poul Niclassen. Fleiri av teimum fyrru vóru danir í Føroyum.

Poul Niclassen man hava verið tann mest kendi frá teirri tíðini. Hann var blaðstjóri frá 1918-1936. Í hansara tíð vóru stór tøknilig framstig gjørd á prentsmiðjuni, samstundis sum tíðindatænstan batnaði munandi. Hóast hann var sambandsmaður var Poul sera tollyntur móti øðrvísi hugsandi. Hann varð enntá lagdur undir at vera sjálvstýrismaður í sambandshami.

## Andrass tryggjaði sær Dimmalætting

Í 1888 byrja tjóðskaparligar rembingar í Føroyum, og tá fara fólk at taka partí fyri og ímóti.

Hetta kemur rættuliga til sjóndar í 1901, tá ið Tingakrossur byrjaði at koma út við tí víðgongda og frílynta Kristin í Geil sum blaðstjóra.

Tá kom at síggjast, hvør munur kundi vera á bløðum. Ein kann næstan siga, at Dimmalætting og Tingakrossur livdu av ”at spilla hvørt annað út.” Hetta er kanska nakað nógv tikið til, men tónin millum bløðini var sera skarpur.

Um hesa tíðina fingu vit eisini floksbýtið, og hvørt av bløðunum fóru í sín part.

Andrass Samuelsen, formaður í Sambandsflokkinum, vildi tryggja sær, at Dimmalætting framvegis skuldi vera málgagn fyri flokkin.

Tað vóru nógvir partaeigarar í felagnum, sum gav Dimmalætting út. Andrass vildi tí tryggja sær meirilutan av partapeninginum. Hann fór at keypa aðrar


*Fyrsti blaðstjóri var Lütje Lützen*


*Annar blaðstjórin var Oliver Petræus Effersøe*


*Rasmus Efffersøe var skiftivís blaðstjóri á Dimmalætting og Føringatíðindi*